# STEYPA FINALUR

## LEIKSKRÁ 2019




2. OG 3. MARS

ATLANTIC AIRWAYS

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

JFK



Magnus Tausen
Formaður

# 20. steypafinalurnar!

Í øllum lívsins viðurskiftum eru tað nakrar ávísar avgerðir, ið hava serligan týdning, og sum koma at fylgja tær alt lívið so ella so. Fyri flogbóltin í Føroyum var avgerðin at skipa fyri steypafinalum ein av hesum løtum, sum kollveltu alt. Ikki bara á vøllinum, men eisini uttanfyri vøllin. Millum fólk, lýsarar og miðlar.

Líka frá fyrsta bríksli fyri 19 árum síðan, hava steypafinalurnar verið sendar beinleiðis í sjónvarpinum. Eg minnist enn nógvu viðmerkingarnar aftaná fyrstu steypafinalunar. Leikararnir vóru væl nøgdir, áskoðararnir um enn ov fáir, hildu vit, vóru eisini nøgdir, men serliga vóru tað viðmerkingarnar frá nógvu hyggjarunum heima úr stovunum, eg minnist. Síðani tá er alt vaksið so ótrúliga nógv. Taraflex-gólvið, nýggja høllin á Hálsi, allar ungdómsfinalurnar og alsamt hækkandi góðskan á sjónvarpsupptøkunum. Vit standa einki aftanfyri tilsvarandi finalur í stórum londum. Tað eiga vit at vera fegin um.

Í dag eru tað so trý feløg, sum skulu royna seg. Fleyr við bæði kvinnum og monnum. SÍ við sínum kvinnum og Mjølnir við monnunum. Talan er í øllum førum um lið, sum hava roynt hetta fyrr, men at vinna eina finalu er altíð nakað heilt serligt. Nakað, sum eingin kann gerast troyttur av.

Leiðin til finalurnar var umvegis hálvfinalur undir allar bestu kørmum í Klaksvík fyri tveimum vikum síðan. Badmintonhøllin var umskapað til flogbóltsarena, og liðini á vøllinum góvu okkum sanna flogbóltsuppliving. KÍF og Mjølnir hjá kvinnunum og ÍF og SÍ hjá monnunum skulu her fáa eina tøkk fyri sín lut tann dagin. Tit komu so nær.

Dystirnir í dag standa ímillum fremstu liðini í landskappingini, so okkurt bendir á, at hetta eru sterkastu umboðini fyri flogbóltin í Føroyum júst nú. SÍ kvinnurnar vundu burturúr Fleyr í Sørvági fyri viku síðan, so tær hava sjálvsálitið í ordan. Og hjá monnunum er uppgávan hjá Fleyr ógvuliga líkatil. Teir skulu gera tað ómøguliga í ár – vinna á Mjølni. Tað hevur eingin megnað higartil, men finalur eru øðrvísi. Og tað er júst tað, vit elska við finalum. Alt kann henda.

Sum vant sleppa øll tey ungu eisini at spæla við bestu kørmum. Tað gera tey undir stórum trýsti frammanfyri stórari áskoðarafjøld. Hetta er í sjálvum sær stórt hjá teimum, men sæð í eini longri tilgongd, er hetta týdningarmikið stig inn á størri pallar, har fleiri av hesum ungu fara at umboða Føroyar á ungdómslandsliðum og kanska A-landsliðnum.

Frá okkum í nevndini í Flogbóltssambandi Føroya skal eg ynskja øllum liðunum til lukku við steypafinaluplássinum og takka kommunum og lýsarum, at tit skapa karmar kring landið og gera tað møguligt at skipa fyri tiltøkum sum hesum.

**Útgevari:** Flogbóltssamband Føroya • Tel. 318 766 / 218 766 • fbf@fbf.fo • www.fbf.fo
**Sniðgeving, umbróting og prentumsiting:** Sendistovan • www.sendistovan.fo


# Hágóðsku vørur frá Änglamark

coop ÄNGLAMARK



**Allar matvørurnar eru vistfrøðiligar. Aðrar Änglamark vørur eru bæði umhvørvis- og ovurviðkvæmisvinarligar. Vøruúrvalið er breitt og fevnir um alt líka frá vaskipulvuri til tomatir, frá smábarnamati til køksrullur**

Føroya Keypssamtøka



**Annika Olsen**
Borgarstjóri í Tórshavnar kommunu

# Flogbólturin gongur undan

So eru aftur tveir sera spennandi dagar á skránni hjá flogbóltinum, nú tilsamans fimtan steypafinalurnar skulu avgerast. Hvør einasti bóltur er avgerandi, tí tað er bara hesin eini dysturin, har alt skal avgreiðast. Hinvegin er tað eisini ein stórur sigur í sjálvum sær, at tað eydnast at røkka so langt í steypakappingini, so tit kunnu øll somul vera errin av tykkara avrikum higartil.

Í ár eru tjúgu ár liðin, síðani Flogbóltssamband Føroya fór undir at skipa steypafinalurnar sum eina ítróttarhending fyri seg, og tí kunnu vit staðfesta, at flogbólturin á hesum øki hevur gingið undan og skapt nakað, onnur eisini hava tikið til sín. At megna nýhugsan og eisini at hava dirvi til at føra síni hugskot út í lívið, er gull vert!

Mong eygu eru sjálvandi vend ímóti steypafinalunum hjá kvinnum og monnum, har vit í høvuðsstaðnum kunnu fegnast um, at Fleyr er við í báðum, ávikavist ímóti SÍ og Mjølni, og báðar finalur avspegla eisini toppin í landskappingini.

Hjá teimum yngru eru tað serliga SÍ og Fleyr, ið gera vart við seg við ávikavist tíggju og átta liðum í steypafinalunum. Men eisini er KÍF væl á veg við trimum finaluliðum, eins og ÍF hevur tvey og Dráttur, Mjølnir og TB hvør sítt lið við. Hugaligt at síggja, at umboðanin kemur úr øllum landinum.

Vit í høvuðsstaðnum fegnast um, at vit kunnu skapa karmar um steypafinalurnar í flogbólti. Tað er stuttligt at samstarva við flogbóltin, sum er ein av okkara virknastu ítróttargreinum, bæði í heimligu steypa- og landskappingunum, men ikki minst í góða landsliðsarbeiðinum, bæði burturi og heima.

Eg vil vegna Tórshavnar kommunu ynskja tykkum øllum hjartaliga vælkomin og somuleiðis ynskja tykkum øllum somlum góðan dyst!







Aimé Jacobsen
Borgarstjóri í Sørvágs kommunu

# Koyr so á SÍ

Aftur í ár skipar Flogbóltssamband Føroya fyri steypafinalum í flogbólti. Steypafinalurnar eru nakað heilt serligt í føroyskum flogbóltshøpi og hava fingið eina serstaka tign. Høllin á Hálsi er pyntað og gjørd klár, og bæði fjølmiðlar og áskoðarar gera nógv burturúr.

Hetta er 12. árið á rað, at borgarstjórin í Sørvágs kommunu kann bera felagnum SÍ eina heilsan í almennu leikskránni. Bert fáar ferðir, síðan byrjað varð við finalunum fyri 20 árum síðan, hevur Sørvágs Ítróttarfelag ikki verið umboðað í annaðhvørt báðum ella aðrari flogbóltsfinaluni í bestu deildini.

Hesa ferð eru tað okkara kvinnur, sum møta Fleyr. Men vit skulu ikki gloyma allar ungdómsfinalurnar, har SÍ aftur í ár er stak væl umboðað. Tað er flott!

Slík avrik og úrslit koma so sanniliga ikki av sær sjálvum. Tað liggur eitt miðvíst arbeiði og stórur innsatsur aftanfyri. Og tað krevur, at ein stórur felagsskapur av bæði spælarum, venjarum, nevndarlimum, foreldrum, hjálparfólkum og fjepparum lyfta í felag.

Fyri tveimum vikum síðani spældi kvinnu-meistaradeildin hjá SÍ ein sera spennandi hálvfinaludyst móti KÍF í Klaksvík. Áðrenn dystin vóru tær helst favorittar til at vinna hálvfinaluna, um hugt var at stigatalvuni í landskappingini, tí tær høvdu nógv fleiri stig. Men KÍF gekk teimum ein skarpan gang, og tá ið fimm sett vóru leikt, har bæði liðini sýndu øgiligan stríðsvilja, hevði SÍ munin. Tær vunnu tíbetur 3-2.

Síðsta sunnudag møttu tær sama liði, sum tær spæla ímóti í finalunu í dag, og har var eingin slingur í valsinum. Tær smurdu Fleyr av 3-0 og liggja nú á odda í landskappingini. Vit vóna sjálvandi, at tær raka dagin aftur í dag og koma vestur við steypinum.

Vegna okkum í Sørvágs kommunu fari eg at takka Sørvágs ítróttarfelag fyri tað stóra arbeiðið, sum verður gjørt fyri okkara børn og ungdóm!

At enda fari eg at ynskja tykkum øllum, ið vunnu tykkum upp í steypafinalurnar, eitt gott flogbóltsvikuskifti. Vónandi varðveita tit framhaldandi sessirnar á ovastu rókum.









# *Vága kommuna ynskir Drátti allar bestu eydnu*



VÁGA KOMMUNA SETUR TRIVNAÐ OG UMHVØRVI Í HÁSÆTI

# VÁGA KOMMUNA

## – ALTÍÐ VERD EINA VITJAN

- Kálvalíð
- Krígssavnið
- Kaminan í Vatnsoyrum
- Lakeside
- Sandavágs Kirkja
- Miðvágs Kirkja
- Minnisvarðin yvir Hammershaimb
- Minnisvarðin yvir Jens Paula Heinesen
- Minnisvarðin yvir Mikkjal á Ryggi
- Gøtan út til Trøllkonufingur
- Gongutúrur til Bøsdalafoss
- Gongutúrur til Fjallavatn
- Gongutúrur til Presttanga
- Gongutúrur til Slættanes

GISTAST KANN Á VALLARAHEIMINUM Á GILJANESI



Vága kommuna
Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur
Tel: (+298) 34 44 00
Fax: (+298) 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

VÁGA KOMMUNA



Kristin Michelsen
Borgarstjóri í Tvøroyra kommunu

# Góða eydnu øll somul

Komandi vikuskiftið skipar Flogbóltssamband Føroya, fyri 20. Ferð, fyri finaludøgum fyri allar deildir uttan flogbørn, ið eru okra tilfeingið til at menna flogbóltin. Tó eru flogbørnini ikki gloymd. Flogbóltsambandið hevur gjørt av at hava ein stóran flogbóltsdag í Kollafirði hin 9. mars og tað eigur felagsskapurin stórt rós fyri.

Hetta er vikuskiftið, ið øll síggja fram til tá byrjað verður at venja til kappingarárið - henda stóra finaludag. Tó eru tað ikki øll, ið røkka hesum máli, hóast øll gera sítt besta fyri at røkka tí.

Tað er eisini at fegnast um, at øll Ítróttarsambondini hava valt at markera finaludagarnar, tí tað er ikki smávegis av tíð, ið okra ungdómur, venjararar og tey, ið vara av feløgnum, brúka. Nærum alt er ólønt og stóra tøkk eiga tykur fyri tað.

Frá TB-flogbólti hava okur eitt lið við í ár og tað er dreingir 12 ár. Undanfarin ár hava okur havt fleiri lið við. Jeg vil, vegna Tvøroyrar kommunu, ynskja TB 12 dreingum góða eyðnu í finaluni.

Tvøroyrar kommuna fegnast aftur í ár um, at Flogbóltssamband Føroya hevur gjørt av at spæla FM-finalur fyri tey yngru, í høllini í Trongisvági vikuskiftið 30 og 31 mars og verða vertur fyri hesum FM finalum, tí betri umstøður enn í Trongisvági finnast ikki í landinum.

Tvøroyrar Kommuna vil ynskja teimum, ið hava spælt seg í steypafinalurnar, FBF, og øllum, ið vara av flogbóltinum runt um í landinum, eitt gott flogbóltsvikuskiftið Okur síggjast til FM-finalur í Trongisvági 30. og 31. mars.





LEYGARDAGIN 2. MARS **KL. 13.30**

## FLEYR MENN



**Liðformaður:**
Rói Hentze

**Venjari:**
Slavisa Tomic

**Hjálparvenjari:**
Hjalmar Joensen

**Høvuðstuðul:**
Articon

| | Leikarar | Aldur | Hædd | Leikpláss | Lands-dystir |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Mattias Nolsøe Isaksen | 15 | 181 | Kantur | 0 |
| 2 | Hans Fróði Jensen | 36 | 181 | Hevari | 22 |
| 4 | Tórur Paulason | 15 | 196 | Miðblokkur | 0 |
| 5 | Hørður Joensen | 14 | 187 | Kantur | 0 |
| 7 | Niels Niclasen | 20 | 188 | Hevari | 9 |
| 8 | Jógvan Gøthe Magnusson | 15 | 188 | Diagonalur/kantur | 0 |
| 9 | Rói Hentze | 26 | 178 | Kantur | 29 |
| 10 | Rasmus Mortensen Potts | 24 | 188 | Diagonalur | 18 |
| 11 | Suni Juul Pedersen | 36 | 201 | Miðblokkur | 83 |
| 13 | Jens Heri Bolstad Mortensen | 43 | 184 | Libero/Kantur | 29 |
| 15 | Slavisa Tomic | 30 | 186 | Kantur | 0 |
| 18 | Uni Jacobsen | 20 | 198 | Miðblokkur | 0 |
| 17 | Sjúrður Jensen | 22 | 181 | Libero/Diagonal/Kantur | 0 |
| 19 | Hans Sejer Tummasarson | 19 | 175 | Libero | 0 |

## MJØLNIR MENN



**Liðformaður:**
Thorvald Danielsen

**Venjari:**
Phil Freere

**Hjálparvenjari:**
Trygvi Hoydal Poulsen

**Liðleiðari:**
Eyðstein Elttør
Páll Heðin í Grund

**Høvuðsstuðul:**
Norðlýsið

| | Leikarar | Aldur | Hædd | Leikpláss | Lands-dystir |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Trygvi Hansen | 24 | 196 | Miðja | 31 |
| 2 | Bjarki Bertholdsen | 19 | 194 | Miðja | 0 |
| 3 | Arthur Højgaard | 28 | 189 | Miðja | 0 |
| 4 | Phil Freere | 22 | 190 | Kantur | 0 |
| 5 | Jón Syderbø | 31 | 181 | Miðja | 15 |
| 6 | Thorvald Danielsen | 32 | 193 | Hevari | 68 |
| 9 | Dávið Hentze | 18 | 180 | Diagonal | 2 |
| 11 | Steffan Rosenlund Olsen | 25 | 195 | Kantur | 21 |
| 12 | Olaf Karsensson Hansen | 17 | 182 | Libro | 0 |
| 13 | Símun Hoydal Poulsen | 16 | 179 | Libro | 0 |
| 14 | Jóhan Dávur Højgaard | 36 | 189 | Kantur | 0 |
| 15 | Hanus Hansen | 18 | 177 | Kantur | 0 |
| 16 | Jóan Petur Samnson Jónsson | 15 | 186 | Miðja | 0 |



SUNNUDAGIN 3. MARS **KL. 16.00**

## FLEYR KVINNUR



**Liðformaður:**
Anna Sára Skaalum

**Venjari:**
Kristian Mikkelsen

**Hjálparvenjari:**
Jákup W. Sivertsen

**Fysioterapeut:**
Klæmint Isaksen

**Liðleiðari:**
Anja Danielsen

**Høvuðstuðul:**
Kemilux

| | Leikarar | Aldur | Hædd | Leikpláss | Lands-dystir |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Bjørk Nolsøe Isaksen | 18 | 174 | Kantur | 0 |
| 2 | Ása Fredriksberg | 22 | 176 | Kantur | 4 |
| 4 | Manja Lisberg | 28 | 167 | Hevari | 0 |
| 5 | Súsanna Sólrunardóttir Ludvig | 21 | 183 | Miðja | 4 |
| 6 | Anna Sára Leivsdóttir Skaalum | 26 | 173 | Kantur | 8 |
| 7 | Hilda Bolstad Mortensen | 18 | 172 | Kantur | 0 |
| 8 | Kristina Østerø Knudsen | 20 | 169 | Libero | 0 |
| 10 | Katrin Petersen | 29 | 174 | Miðja | 12 |
| 11 | Bára Holm Jacobsen | 25 | 174 | Diagonalur | 3 |
| 12 | Barbara Durhuus | 16 | 177 | Miðja | 0 |
| 13 | Inge Marie Rasmussen | 29 | 157 | Libero | 4 |
| 14 | Vár Rajani Færø | 16 | 170 | Hevari | 0 |
| 15 | Simonika Hammer | 28 | 172 | Diagonalur | 0 |
| 17 | Bjarta Jákupsdóttir | 16 | 171 | Miðja | 0 |

## SÍ KVINNUR



**Liðformaður:**
Vivian Joensen

**Venjari:**
Annika á Stongum

**Hjálparvenjari:**
Jakup Melchior Hansen

**Høvuðstuðul:**
Hiddenfjord og Sp/f Mykines

| | Leikarar | Aldur | Hædd | Leikpláss | Lands-dystir |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Tórfríð Tavsen | 34 | 164 | Libero | 0 |
| 2 | Bettý Eyð Ellingsgaard | 21 | 170 | Diagonal | 0 |
| 3 | Annika Niclasen | 33 | 172 | Miðblokkur | 0 |
| 4 | Mona Sunnuvudóttir Poulsen | 19 | 163 | Diagonal | 0 |
| 5 | Maria Sarita Lorenzen | 20 | 175 | Miðblokkur | 0 |
| 6 | Sissal Ellefsdóttir | 19 | 173 | Kantur | 0 |
| 7 | Sólfríð Poulsen | 15 | 158 | Diagonal | 0 |
| 8 | Vivian Joensen | 28 | 172 | Kantur | 0 |
| 9 | Janna Falkvard | 16 | 165 | Hevari | 0 |
| 10 | Katrina Josefina Eliasdóttir | 16 | 156 | Libero | 0 |
| 11 | Jórunn Elisdóttir Vang | 20 | 177 | Miðblokkur | 0 |
| 12 | Inga Helena Henriksen | 16 | 170 | Kantur | 0 |
| 13 | Kristina Mouritsen | 21 | 165 | Hevari | 0 |
| 14 | Katla Henriksen | 19 | 168 | Kantur | 0 |

## GENTUR 12

**SÍ** | **DRÁTTUR** | LEYGARDAG **KL. 9.00**

| SÍ | | DRÁTTUR | |
|---|---|---|---|
| 1 | Marita Andrea Hansen | 3 | Jasmin Prior Braga |
| 2 | Sára Kambsgarð | 9 | Karin Vang Jacobsen |
| 3 | Edna Henriksen | 10 | Emma Vilhelmsdóttir |
| 4 | Sára Weihe Simonsen | 11 | Vár Edvardsdóttir |
| 5 | Lisa Haraldsen | 12 | Julia Svabo Samuelsen |
| 6 | Andreja Petrovic | | |
| 7 | Marin av Trøð Lauritsen | | |
| 8 | Rikka Allansdóttir Joensen | | |
| 9 | Sofía Edvinsdóttir Khaliqi | | |
| 10 | Elin Hovgaard | | |
| 12 | Súsanna Maria Magnussen | | |

## GENTUR 14B

**FLEYR** | **KÍF** | LEYGARDAG **KL. 10.00**

| FLEYR | | KÍF |
|---|---|---|
| 8 | Helena S. Hansen | Eyð Á Reynatúgvu |
| 36 | Brynja Jákupsdóttir | Silja Hellisdal |
| 41 | Siv Niclassen | Sigvør Olivia Olsen |
| 42 | Heiðrun S. Fjalsbak | Ronja Ólavsdóttir |
| 44 | Lív Bára D. Hansen | Mia Olsen |
| 48 | Sólja Rúnadóttir | Joana Johannesen |
| 49 | Kasia Jablonowski | Ása Thorkilshøj |
| 59 | Ronja G. Justinussen | Arina Joensen |
| 62 | Gunnvá Winther | Maria Petersen |
| 63 | Marjun Garðsá | |
| 64 | Ria Danielsen | |

## DREINGIR 12

**ÍF** | **TB** | LEYGARDAG **KL. 18.30**

| ÍF | TB | |
|---|---|---|
| Vuk Ilic | 1 | Rasmus Bruhn |
| Filip Ilic | 2 | Tummas Pauli Christiansson |
| Árni Mohr | 3 | Olivur Øster |
| Hákun Nón | 4 | Hjartan Sørensen |
| Silas Toftegaard | 5 | Ranja Jóhannesdóttir Magnussen |

## MANS-UNGLINGAR

**SÍ** | **ÍF** | LEYGARDAG **KL. 19.45**

| SÍ | | ÍF | |
|---|---|---|---|
| 1 | Oskar í Haraldstovu Weihe | 1 | Kristian Hansen |
| 2 | Silas Poulsen | 2 | Ingálvur Olsen |
| 3 | Elias Petersen | 3 | Jóhan Højbro |
| 4 | Ari í Haraldsstovu Petersen | 4 | Áslakur Holm |
| 6 | Teitur Anderson | 5 | Martin Lamhauge |
| 7 | Róar Anderson | 6 | Torfinnur Við Gjónna |
| 8 | Jógvan Kári Birgirson Lauritsen | 7 | Rúnar Johnson |
| 9 | Julian Vest Niclasen | 8 | Hjørtur Sólstein |
| 10 | Bjarni Joensen | 10 | Tróndur Hansen |
| 11 | Jón Weihe Simonsen | 12 | Joel Joensen |
| 12 | Ragnar Weihe | 13 | Teitur Eliasen |
| 13 | Tóki í Haraldsstovu | 14 | Meinhard Mohr |
| 14 | Hjørtur Joensen | 15 | Petur Meinhard Lundsbjerg |

## GENTUR 14A

**SÍ** | **KÍF** | SUNNUDAG **KL. 13.00**

| SÍ | | KÍF |
|---|---|---|
| 1 | Rannveig Rós Joensen | Kristianna Bartalsdóttir |
| 2 | Sára Kambsgarð | Julia Lykke |
| 3 | Tóta Búadóttir | Maria Lykke |
| 4 | Laura Skov Weihe | Milja Silvansdóttir |
| 5 | Malan Maria í Haraldstovu Weihe | Anita Joensen |
| 6 | Bára Jansdóttir | Marta Fagraklett |
| 7 | Marin av Trøð Lauritsen | Rebekka Olsen |
| 8 | Fríða Haraldsen | Silja Hellisdal |
| 9 | Súsanna Maria Magnussen | Eyð á Reynatúgvu |
| 10 | Maria Magnussen | Ronja Ólavsdóttir |
| 11 | Sofía Weihe Simonsen | |
| 12 | Anja Sólja Niclasen | |
| 13 | Elin Hovgaard | |
| 14 | Rikka Allansdóttir | |
| 15 | Lisa Haraldsen | |
| 16 | Andreja Petrovic | |



## DREINGIR 15

**SÍ** | **FLEYR** | SUNNUDAG **KL. 14.15**

| SÍ | | FLEYR | |
|---|---|---|---|
| 1 | Silas Poulsen | 31 | Leivur Jøkladal |
| 4 | Tóki Í Haraldstovu | 32 | Hørður Joensen |
| 5 | Atli Falkvard | 33 | Mattias N. Isaksen |
| 6 | Róar Í Haraldstovu | 34 | Markus H. Olsen |
| 7 | Lukas Poulsen | 37 | Tórður M. Johannesen |
| 8 | Róar Anderson | 38 | Tórur Paulason |
| 9 | Elias Petersen | 39 | Eyðfinn R. Færø |
| 10 | Bjarni Joensen | 40 | Jógvan Magnusson |
| 11 | Mattias Falkvard | 41 | Boas á Lakjuni |
| 12 | Malan Maria í Haraldstovu Weihe | | |

## GENTUR 16

**FLEYR** | **SÍ** | SUNNUDAG **KL. 15.30**

| FLEYR | | SÍ | |
|---|---|---|---|
| 31 | Eydna Eidesgaard | 1 | Rannveig Rós Joensen |
| 32 | Bjørt Holm | 2 | Rannvá Kambsgarð |
| 33 | Brynhild Joensen | 3 | Tóta Búadóttir |
| 34 | Barbara K. Durhuus | 4 | Josefina Eliasdóttir |
| 35 | Kezia Zachariassen | 5 | Malan Maria í Haraldstovu Weihe |
| 36 | Esther Á. Haraldsen | 6 | Inga Helena Henriksen |
| 37 | Vár R. Færø | 7 | Sólfríð Poulsen |
| 38 | Maria L. Foget | 8 | Hallgerð Tonysdóttir Haraldsen |
| 39 | Ró D. Jacobsen | 9 | Janna Falkvard |
| 40 | Bjarta Jákupsdóttir | 10 | Fríða Haraldsen |
| | | 11 | Sofía Weihe Simonsen |
| | | 12 | Anja Sólja Niclasen |
| | | 13 | Turið Búadóttir |
| | | 14 | Laura Skov Weihe |
| | | 15 | Maria Magnussen |
| | | 16 | Bára Jansdóttir |

## DREINGIR 17

**SÍ** | **FLEYR** | SUNNUDAG **KL. 16.45**

| SÍ | | FLEYR | |
|---|---|---|---|
| 1 | Silas Poulsen | 31 | Leivur Jøkladal |
| 3 | Elias Petersen | 32 | Hørður Joensen |
| 4 | Ari í Haraldsstovu Petersen | 33 | Mattias N. Isaksen |
| 6 | Jón Weihe Simonsen | 34 | Markus H. Olsen |
| 7 | Róar Anderson | 37 | Tórður M. Johannesen |
| 8 | Jógvan Kári Birgirson Lauritsen | 38 | Tórur Paulason |
| 9 | Julian Vest Niclasen | 39 | Eyðfinn R. Færø |
| 10 | Bjarni Joensen | 40 | Jógvan Magnusson |
| 12 | Ragnar Weihe | 41 | Boas á Lakjuni |
| 13 | Tóki í Haraldsstovu | | |
| 14 | Hjørtur Joensen | | |

## GENTUR 19

**SÍ** | **KÍF** | SUNNUDAG **KL. 18.00**

| SÍ | | KÍF |
|---|---|---|
| 1 | Josefina Eliasdóttir | Birgitta Eddiesdóttir |
| 2 | Rannvá Kambsgarð | Dagny Thorkildshøj |
| 3 | Turið Búadóttir | Elin Petersen |
| 4 | Tóta Búadóttir | Elsa Samuelsen |
| 5 | Anja Sólja Niclasen | Jakobina Joensen |
| 6 | Sofía Weihe Simonsen | Kristianna Bartalsdóttir |
| 7 | Sólfríð Poulsen | Jóhanna Samuelsen |
| 8 | Katla Henriksen | Maria Lykke Johannesen |
| 9 | Janna Falkvard | Marita Thorkildshøj |
| 10 | Malan Maria í Haraldstovu Weihe | Marta Fagraklett |
| 11 | Hallgerð Tonysdóttir Haraldsen | Milja Silvansdóttir |
| 12 | Inga Helena Henriksen | Silja Hammer Matras |
| 13 | Bára Jansdóttir | |
| 14 | Rannveig Rós Joensen | |

**DREINGIR 19** | **SÍ** – **FLEYR** | SUNNUDAG **KL. 19.15**

| SÍ | | FLEYR | |
|---|---|---|---|
| 1 | Oskar í Haraldstovu Weihe | 19 | Hans Seier Tummasarson |
| 2 | Silas Poulsen | 31 | Leivur Jøkladal |
| 3 | Elias Petersen | 32 | Hørður Joensen |
| 4 | Ari í Haraldsstovu Petersen | 33 | Mattias N. Isaksen |
| 6 | Jón Weihe Simonsen | 34 | Markus H. Olsen |
| 7 | Róar Anderson | 37 | Tórður M. Johannesen |
| 8 | Jógvan Kári Birgirson Lauritsen | 38 | Tórur Paulason |
| 9 | Julian Vest Niclasen | 39 | Eyðfinn R. Færø |
| 10 | Bjarni Joensen | 40 | Jógvan Magnusson |
| 12 | Ragnar Weihe | 41 | Boas á Lakjuni |
| 13 | Tóki í Haraldsstovu | | |
| 14 | Hjørtur Joensen | | |

**KVINNU-UNGLINGAR** | **SÍ** – **FLEYR** | SUNNUDAG **KL. 20.30**

| SÍ | | FLEYR | |
|---|---|---|---|
| 1 | Josefina Eliasdóttir | 1 | Bjørk N. Isaksen |
| 2 | Rannvá Kambsgarð | 3 | Veronica Tani |
| 3 | Turið Búadóttir | 4 | Vár R. Færø |
| 4 | Tóta Búadóttir | 5 | Súsanna S. Ludvig |
| 5 | Anja Sólja Niclasen | 7 | Hilda B. Mortensen |
| 6 | Sofía Weihe Simonsen | 8 | Kristina Knudsen |
| 7 | Sólfríð Poulsen | 9 | Ester Á. Haraldsen |
| 8 | Katla Henriksen | 12 | Barbara K. Durhuus |
| 9 | Janna Falkvard | 14 | Bjarta Jákupsdóttir |
| 10 | Malan Maria í Haraldstovu Weihe | | |
| 11 | Hallgerð Tonysdóttir Haraldsen | | |
| 12 | Inga Helena Henriksen | | |
| 13 | Bára Jansdóttir | | |
| 14 | Rannveig Rós Joensen | | |


**HAVNAR FYSIOTERAPI**

Certified McKenzie Clinic

**Ítróttar- og ryggklinikkin**

Tlf. 312 131
fysioterapi@fysioterapi.fo
www.fysioterapi.fo




# STEYPAVINNARAR
## UNDANFARIN ÁR

| MENN | | | KVINNUR | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **2018** | SÍ – ÍF | 3-2 | **2018** | Fleyr – Dráttur | 3-2 |
| **2017** | Fleyr – SÍ | 3-1 | **2017** | KÍF – TB | 1-3 |
| **2016** | ÍF – SÍ | 3-0 | **2016** | Fleyr – SÍ | 3-0 |
| **2015** | SÍ – ÍF | 3-2 | **2015** | Dráttur – TB | 3-2 |
| **2014** | ÍF – SÍ | 3-0 | **2014** | Mjølnir – Fleyr | 3-0 |
| **2013** | ÍF – SÍ | 3-2 | **2013** | Mjølnir – SÍ | 3-1 |
| **2012** | SÍ – Mjølnir | 3-0 | **2012** | Mjølnir – SÍ | 3-1 |
| **2011** | ÍF – Mjølnir | 3-2 | **2011** | Mjølnir – SÍ | 3-2 |
| **2010** | SÍ – Mjølnir | 3-1 | **2010** | SÍ – Dráttur | 3-2 |
| **2009** | ÍF – SÍ | 3-1 | **2009** | SÍ – Fleyr | 3-1 |
| **2008** | SÍ – Mjølnir | 3-1 | **2008** | SÍ – ÍF | 0-3 |
| **2007** | Mjølnir – ÍF | 3-0 | **2007** | Dráttur – KÍF | 3-2 |
| **2006** | Fleyr – Mjølnir | 0-3 | **2006** | TB – ÍF | 3-1 |
| **2005** | SÍ – Mjølnir | 3-0 | **2005** | Mjølnir – TB | 3-1 |
| **2004** | SÍ – ÍF | 0-3 | **2004** | TB – Dráttur | 3-1 |
| **2003** | SÍ – ÍF | 2-3 | **2003** | TB – ÍF | 3-1 |
| **2002** | SÍ – ÍF | 3-0 | **2002** | TB – Mjølnir | 3-1 |
| **2001** | ÍF – Mjølnir | 3-0 | **2001** | Mjølnir – Dráttur | 3-2 |
| **2000*** | Fleyr – Mjølnir | 1-2 | **2000*** | Dráttur – Mjølnir | 0-2 |

*Í fyrstu steypafinalunum í ár 2000 varð leikt við „Nordic Score" stigaskipanini. – Sí niðanfyri!

### *NORÐURLENDSK STIGASKIPAN* – NORDIC SCORE

Í ár 2000 var í Norðurlondum eksperimenterað við einari serligari norðurlendskari stigaskipan, men henda var kortini skjótt slept aftur.

Spælt var í hálvleikum, og tað liðið sum fyrst vann tveir hálvleikir, vann dystin. Um liðini vunnu hvør sín hálvleik, so var dysturin avgjørdur við einum javnbrótara, sum gekk upp í 15.

Í hvørjum hálvleiki galt um at vinna tvey sett. Hvørt settið gekk upp í 21. Tann sum so fyrst vann tvey sett, hevði tá vunnið ein hálvleik. Men um liðini vunnu hvør sítt sett, so var hálvleikurin avgjørdur við einum javnbrótara, sum einans gekk upp í 7!

Innviklað? Tja... kanska tað ikki var so løgið, at henda skipanin ikki vann frama.

# Flogbørn –
# Ársins ítróttaátak



ÍSF heiðraði herfyri ársins ítróttarfólki, eldsál og ítróttaátaki. Hetta er frálíkt átak, sum ÍSF hevur tikið stig til. Og tað kunnu vit í Flogbóltssambandi Føroya saktans siga, tí okkara Flogbørn vórðu í ár vald til ársins átak.

Tað eru hjúnini Peter og Anne, sum fyri Flogbóltssambandið standa fyri Flogbørnum í Føroyum. Peter hevur staðið fyri at menna Kidsvolley í Danmark, og er yvirhøvur ein maður, sum seinastu nógvu árini hevur verið ein av súlunum undir flogbóltinum í Danmark.

Tíbetur høvdu Peter og Anne ein dreym um at koma til Føroyar at búgva. Tey ynsktu sær eitt ævintýr. Hesum ævintýrinum gjørdust vit partur av. Tey hava vitjað í øllum skúlum, og í nógv teimum flestu av teimum, hava tey havt undirvísingargongdir saman við lærarum og børnum.

So seint sum í hesi vikuni hevur skúlakapping verið kring Skálafjørðin, har børnini hava dystast um at koma í endaligu finaluna fyri skúlanæmingar, sum verður í Havn síðst í mars. Hesar skúlakappingar hava verið um allar Føroyar. Tað serliga hesaferð var, at umboð fyri flogbóltsmenning í CEV, Evropeisku flogbóltssamgonguni vóru til staðar. Og hesi umboð eru ovfarin av børnum okkara og tí undirtøku, ið Flogbørn hava fingið í skúlunum.

Aftur í ár hava vit tikið stig til, at Flogbørn eru í høllini á Hálsi í sambandi við steypafinalurnar. Hugsanin er, at øll børnini og teirra avvarðandi kunnu koma til steypafinalu. Kanska okkurt flogbarn einaferð er á vøllinum í steypafinalu. Tað vóna vit, men mest avgerandi er tó, at øll børn í Føroyum við okkara átaki hava havt møguleikan at gerast partur av Flogbørnum og soleiðis saman við floksfeløgum sínum roynt sítt ítasta at vinna fyri flokkin og skúlan. Einki einstakt barn kann vinna alt sjálvt, men bara saman við floksfeløgunum í felagsskapi. Tað er ryggurin í Flogbørnum.

Og nú eru øll hesi børnini ársins ítróttaátak. Til lukku við tí !






ATLANTIC AIRWAYS

Atlantic Airways Vága Floghavn FO-380 Sørvágur Tel. 34 10 00 www.atlantic.fo